# 100 ár aftur í tíðina

**Við fólkalívsmyndunum førdi Norðoya Fornminnafelag fólk umleið 100 ár aftur í tíðina. Framsýningin var á fótbóltsvøllinum beint undan fótbóltsdystinum norðoyastevnudag, og nógvir áskoðarar vóru tilstaðar**

FÓLKALÍVSMYNDIR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



pFólkalívsmyndir vóru fyrstu ferð á skránni í 1960, og hava tær javnan verið síðani tað

*Mynd: Jan Müller*

**Klaksvík:**
Við gamla bátinum hjá Norðoya Fornminnafelag róðu átta mans frá Blikksmiðjuni og yvir til dráttin uttan fyri kappróðrarneystið. Har varð báturin drigin upp á land og fingin á ein vogn. Helst tað einasta tekinið um, at hetta ikki gekk fyri seg fyri 100 árum síðani.

Síðani gingu tey yvir í móti rundkoyringini á posthúshorninum, har tey bíðaðu eftir skrúðgonguni.

Tá hornorkestrið var farið framvið, fóru fólkalívsmyndirnar við í skrúðgonguna, meðan skótar, ítróttarfólk og fólk á hestbaki gingu aftaná niðan í Vágstún.

Tá fólkafundurin var av, gingu tey úr Vágstúni yvir á fótbóltsvøllin, har framsýningin fór fram.

Veðrið var so toluligt hesa løtuna, og tað var sera áhugavert at síggja hesi fólkini.

Bátsmanning, dragarar, stásfólk, grindamenn, neytakonur, sløttumenn, hoykonur, torvfólk, veltingarfólk, fleygamenn og línuberarar, fjallmenn og smábørn. Øll í kløðd sum fyrr í tíðini. Bátsmanningin sat í bátinum, meðan dragararnir drógu hann aftaná.

Jógvan Ravnsfjall greiddi frá, meðan fólkini vístu, hvussu arbeitt varð fyri umleið 100 árum síðani í Føroyum. Øll vóru íkløðd sum fyri 100 árum síðani – bæði børn og vaksin. Og tað sást eisini, at fleiri av teimum eru von við at vera við til hesa framsýningina. Onkur teirra hevði enntá verið við hvørja ferð, síðani fólkalívsmyndirnar vórðu sýndar fram av fyrstan tíð.

## Upprunin til fornminnafelag

Fólkalívsmyndirnar eru upprunin til Norðoya Fornminnafelag, og vóru tær fyrstu ferð at síggja í 1960. Tá var tað Robert Joensen, sum stóð fyri. Sami Robert tók árið eftir saman við Margit Joensen og Nikláa Poulsen, stig til at stovna eitt felag, sum kundi varðveita øll hesi klæðini og amboðini. Og tað var Norðoya Fornminnafelag.

Fólkalívsmyndirnar hava síðani verið javnan at sæð á norðoyastevnu. Seinast undan hesuferðini í 1995.

Jógvan Ravnsfjall sigur, at flestu av fólkunum eru tey somu.

– Fleiri eru jú eld nógv, men eg haldi ikki, at tað var nakar stórur trupulleiki at finna fólk til framsýningina, sigur hann.

Hann veit ikki at siga, nær fólkalívsmyndir aftur verða á skránni, tí tað er ikki nakað ávíst mynstur.

– Tað er sera tilvildarligt, nær tær eru. Í ár eru tað níggju ár síðani seinast, sigur Jógvan Ravnsfjall.



*Fjallmenn og enntá seyðahundar luttóku á framsýningini*

*Mynd: Jan Müller*



*Hugtakandi var tað at síggja hesi framsýningina, og frágreiðingin hjá Jógvani Ravnsfjall var eisini sera áhugaverd*

*Mynd: Jan Müller*



*Fólkalívsmyndirnar komu við í skrúðgonguna úr Klaksvíksgarðinum heim í Vágstún norðoyastevnudag*

*Mynd: Jan Müller*



# Tvær tinglønir er órímiligt

**Løgtings- og fólkatingslimurin Lisbeth L. Petersen heldur tað vera órímiligt og skeivt, at ein føroyskur fólkatings- og løgtingslimur fær tvær tinglønir, hóast hann fer í farloyvi í øðrum sessinum**

FRÁVERA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*- Tað er órímiligt at fáa tvær tinglønir, tá man er í farloyvi í øðrum sessinum, og umframt hetta er tað alt ov kostnaðarmikið fyri løgtingið, um bæði tingmaður í farloyvi og eykamaður skulu hava mánaðarløn á góðar 30.000 krónur, sigur Lisbeth. L. Petersen*

25. mai hugdi Sosialurin nærri at fráveruni hjá tingmonnum, síðani ABC-samgongan tók við, og 8. juni úttalaði løgtingsformaðurin Edmund Joensen seg um fráveruskipanina, sum hann ikki helt vera nøktandi. Somuleiðis helt fólkatings- og løgtingslimurin Høgni Hoydal, at onnur mánaðarlønin, hann og Lisbeth L. Petersen fáa, skuldi verðið tikin burtur, um fólkatingslimirnir ikki megna at røkja báðar sessir og tí velja at fara í farloyvi.

## Fær bert eina løn

Lisbeth L. Petersen er saman við Høgna Hoydal føroyski fólkatingslimurin, sum eisini er í føroyska løgtinginum, og hon heldur somuleiðis, at tað er órímiligt, at ein fólkatingslimur fær sína fólkatingsløn umframt løgtingslønina, hóast hann fer í farloyvi í øðrum tinginum. Í áðurnevndu grein varð sagt, at tingmenn fáa fulla mánaðarløn, hóast teir fara í farloyvi, men hetta er ikki heilt rætt sambært Lisbeth. L. Petersen.

– Ein tingmaður fær bert í løn í farloyvi, um hann fer í fólkatingsfarloyvi, og um orsøkirnar eru aðrar, fær hann ikki løn, sigur fyrrverandi formaður Sambandsfloksins. Sjálv hevur hon sostatt møguleikan at fáa tvær lønir, um hon fer í farloyvi vegna fólkatingsørindi, men hetta metir hon verða órímiligt.

– Tí biði eg altíð um vanligt farloyvi uttan løn, tá eg fari í farloyvi, og umframt hesi motivini er tað alt ov kostnaðarmikið fyri løgtingið, um bæði tingmaður í farloyvi og eykamaður skulu hava mánaðarløn, sigur Lisbeth. L. Petersen.

Spurd, hví hon ikki hevur latið eykamann koma inn, tá hon sambært talvuni hevur verið triðmest fráverandi føroyski tinglimurin, sigur hon, at tað higartil ikki hevur verið neyðugt, og at tað er gjørligt at røkja tveir tingsessir, hóast ein so onkuntíð forsømir.

– Eg havi higartil ikki forsømt nakað samanhangandi tíðarskeið, men talan hevur bert verið um einstakar dagar her og har, og tí hevur farloyvi ikki verið neyðugt, sigur Lisbeth L. Petersen.

## Óneyv skráseting

Viðvíkjandi uppmøtingarskrásetingini í tinginum sigur Lisbeth, at hon als ikki er eftirfarandi.

– Tað kemur meiri enn so fyri, at tingmenn skráseta seg við korti klokkan 10, og so eru teir horvnir aftur fimm minuttir seinni, meðan aðrir sita ein heilan dag, so skrásetingarskipanin er ikki serliga eftirfarandi, tá uppmøtingin í tinginum skal kannast, sigur Lisbeth L. Petersen.

Í løtuni skal farloyvi vera minst 10 dagar, og meðan løgtingsformaðurin Edmund Joensen heldur, at hetta tíðarskeið skal minka, so farloyvi oftari verður tikið í nýtslu, er Lisbeth ósamd.

– Minimum 10 daga farloyvi er hóskandi eftir mínum tykki. Í Grønlandi kann ein tingmaður fara í farloyvi ein dag og lata eykamann koma inn, og tá er skjótt, at hetta verður misbrúkt, sigur løgtings- og fólkatingslimurin. Hon sigur, at tá óbehagilig og umstrídd mál eru á skránni, renna fleiri tingmenn í Grønlandi frá ábyrgdini og lata eykamann koma inn, so 10 dagar er eftir hennara tykki hóskandi.

# Fuglafjørður ímillum trøll og hampafólk

**Í Fuglafirði eru tey ikki bangin fyri at flyta seg út um mentanarlig mørk og bróta upp úr nýggjum. Í løtuni leggja tey seinastu hond á fyrireikingarnar til stóra norðurlendska samtakið "Menniskja í søgn og søgu", sum fer av bakkastokki á Varmakeldu fríggjadagin 2. juli, tá bygdin samstundis hátíðarheldur 35 ára dagin hjá Varmakelduframsýningini og Fuglafjarðar hornorkestri**

MENNISKJA Í SØGN OG SØGU
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

– Tá vit fyrstu ferð hoyrdu hugskotið fyri tveimum árum síðani, var tað neyvan nakar av okkum, sum rættiliga trúði uppá, at hetta fór at bera til, viðgongur Øssur Mohr, listamaður og ein av fyrireikarnum til stóra mentanarsamtakið "Menniskja í søgn og søgu" á Varmakeldu.

Tað sigur seg næstan sjálvt, at tað var eldsálin úr Fuglafirði, Frits Jóhannesen, sum kom við hugskotinum. Og hjá Frits ber alt til – eisini eitt tiltak sum hetta, ið frá byrjan hevur sprongt øll tíðar-, staðar- og listarlig mørk.

Men tað bar til. Og á ytra armi í bátahylinum í Fuglafirði standa longu nú nakrir stabbar, sum tekin um, at tiltakið er við at gerast veruleiki.

## Havið og ævintýrið

Um eina lítla viku byrja fólk úr danska listabólkinum 7:9:13 at seta 5 standmyndir upp á stabbarnar. Standmyndirnar eru úr jarni, tann minsta verður 2 metur og tann hægsta 6 metur høg. Íblásturin er úr listabókini hjá Williami Heinesen, Filsni og Hampafólk, og við havinum í baksýni verða myndirnar standandi sum gandakendar áminningar um, at heimurin ongantíð rættiliga er, sum hann sær út til at vera.

Havið og ævintýrið er eisini karmur um hæddarpunktið á tiltakinum 2. juli kl. 19.00, tá fyrstu tónarnir úr stóru ljóðmyndini "Havljóð" hoyrast úr einum 10. mannafari, sum kemur rógvandi inn eftir vágni. Frammi í skutinum stendur ein kópakona, og í landi standa blásarar úr Fuglafjarðar hornorkestri ímillum trøll og hampafólk (standmyndirnar) á landi og lokka hana nærri við sínum ljóðførum.

## Songur til Mentanarhúsið

Tá kópakonan stígur á land á bátabrúnni, koma fleiri dansarar upp í leikin, og fara øll síðani dansandi gjøgnum ein vatnmúr inn eftir bátabrúnni. Til tónarnar úr ljóðmyndini dansa tey inn í Mentanarhúsið, har trý kór fara at syngja kantanuna "Songur til Mentanarhúsið", sum Alexandur Kristiansen, skald úr Fuglafirði, hevur skrivað til júst hetta høvið. Jazzbrøðurnir Michael, Nicolaj og Emil Hess hava skrivað tónleikin til kantantuna, sum saman við kontrabassini hjá Edvardi N. Debess, hornorkestrinum og kórunum gera Menniskja í søgu og søgn livandi í einum brúsi av ljóði, sangi og tónleiki.

*Tríggir av fyrireikarnum til stóra mentanarsamtakið "Menniskja í søgn og søgu": Suffía við Stein, Øssur Mohr og Malan Kjærbo. Tað er Suffía, sum hevur teknað plakatina til samtakið.*



## Nógvar fyrireikingar

Tað skulu nógvar fyrreikingar til eitt so stórt tiltak, og tað er rættiliga kostnaðarmikið. Ikki minst, tí ein stórur partur av listafólkunum, tónleikarnum umframt standmyndirnar koma úr øðrum Norðurlondum.

– Við tað at hetta er eitt norðurlendskt samtak, hevur tað gingið væl at fáa stuðul úr ymsum norðurlendskum grunnum. Sum er, kostar samlaða tiltakið á leið 600.000 kr, men við stuðli og nógvari vælvild allastaðni frá sær tað í løtuni út til, at tiltakið fer at bera seg, sigur ein sera spentur Øssur Mohr.

Á Varmakeldu verða sjálvsagt hópin av øðrum tiltøkum á skránni. Hesi frætta vit meir um seinni.